## VIÐMERKINGAR

# Tíðin styttist



LISBETH L. PETERSEN
løgtingslimur

Hvat gera vit við úrslitini av Pisa kanningini?

Hvar fór pensjónsreformurin?

Heldur tað almenna lógina um javnstøðu?

Hvat bleiv av nevndini fyri øktum kvinnuleikluti í politikki?

Hesir spurningar hanga í luftini saman við so mongum øðrum spurningum, ið almenningurin hevur áhuga fyri, og omanfyri nevndu spurningar eru bert partur av tí, sum politikarar hava ábyrgdina av og skulu gera nakað við.

Onkur vil helst longu siga, at omanfyri nevndu spurningar eru smáir í mun til so nógv annað, sum hevur størri týdning í okkara samfelag.

Eg kann ikki nokta fyri, at nógv onnur mál eru eftir at loysa, nú meira enn helvtin av hesum løgtingsskeiði er farið aftur um bak, men eg nevni her nøkur dømi, sum hava týdning og eiga at raðfestast høgt.

### Pisa kanningin

Úrslitið av Pisa kanningini verður umrøtt nógv í løtuni, og tað er gott og skal til, men nú skal eisini gerast nakað. Sum ein teirra, ið ikki er læraralærd og ikki havi børn longur í fólkaskúlaaldri, men havi dittað mær at havt at fólkaskúlanum, havi eg ferð eftir ferð fingið at vita, (serliga frá skúlalærarum) at hatta veit eg ov lítið um, tí børnini duga so nógv annað í dag, sum vit ikki dugdu á teirra aldri, og at onki var galið við fólkaskúlanum.

Møguliga er okkurt rætt í tí, men næstan dagliga eru dømi um tørv á almennari vitan hjá bæði børnum og ungum , sum eg ikki skal fara í smálutir við her. Skuldi eg nevnt okkurt, kundi tað t.d. verið vitan um geografi ella førleika í máli og málæru. Tað enska duga tey væl, meðan serliga føroyskt, danskt ella norðurlendskt er í flestu førum alt ov vánaligt.

### Pensjónsreformurin

Pensjónsreformin hava vit tosað um leingi.. Bíðað hevur verið eftir úrsliti frá arbeiðsbólki, sum so ikki bleiv til nakað allíkavæl, alt meðan tíðin gongur.

Slíkur reformur tekur langa tíð at semjast um, tí kunnu vit spyrja av røttum, hvar vit standa í løtuni.

Meðan summi fakfeløg hava tryggjað sínar limir, eru onnur sum standa uttanfyri.

Tað frættist nú, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum er farin í holt við at gera nakað við spurningin, men hvør luttekur í arbeiðnum? Og hvat hendir ?

### Javnstøðulógin

Løgtingið hevur samtykt eina javnstøðulóg, men sjálvt hitt almenna tekur ikki lógina í álvara. Umstøðurnar hjá javnstøðunevndini eru vánaligar, og lógin sjálv fær ikki altíð tey bestu orðini við á vegnum, tá hon verður umrødd á løgtingsins røðarapalli.

Nevndin fyri øktum kvinnuleikluti í politikki.

Skjótt er hálvt ár er farið, síðan nevndin, ið løgtingið samtykti, skuldi farið til verka, men mær vitandi er onki hent enn. Óneyðugt skuldi verið at mint á, at um hálvtannað ár skal nevndin vera liðug við sítt arbeiði. Nevndin skal við næstan ongum pengum seta fleiri tiltøk og kanningar í verk !

Hesi bæði seinastu dømini er ikki nakað henda samgonga kann reypa sær av, tvørturímóti!

### Okkurt gleðiligt tó

Tað eydnaðist endiliga at fáa samtykt bygging av nýggjum hølum til Tekniska skúlan í Tórshavn og høli til Handilsskúlan, ið eisini hevði hølistørv.

Hetta fegnast vit í Sambandsflokkinum serliga um, ikki minst tí royndin hjá okkum í 2003 ikki fekk politiska undirtøku, men nú eydnaðist tað so!

Bert spell, at semja ikki kundi fáast um nýggjan studentaskúla á sama staði eisini. Tað hevði verið til stórt gagn fyri okkara komandi ungdóm og tær avbjóðingar, sum framtíðin fer at bera í sær!

# Færøerne boycotter

PASTOR BENNY BLUMENSAAT,
Esbjerg

Filmatiseringen af »Da Vinci Mysteriet« får premiere rundt om i verden på næste fredag, dog ikke på Færøerne.

Her har Jákup Eli Jacobsen, som leder Færøernes største biograf, sagt nej tak til filmen. Han siger: »Vi vil ikke være dem, der viser noget så blasfemisk«.

Jákup Eli Jacobsen er på linie med den katolske ærkebiskop Angelo Amato, troslærekongregationens sekretær i Vatikanet, som siger: »Da Vinci Mysteriet er en antikristen roman, fuld af fornærmende og historisk og teologisk set fejlagtige påstande om Jesus, Bibelen og kirken. De fleste troende er lette ofre for antikristen propaganda. Ærkebiskoppen opfordrer til, at man boykotter filmatiseringen af romanen og undlader at se den i biograferne. Kristne, sagde han, bør være mere opmærksomme på at tilbagevise usandheder om Kirken og troen.

En boykot af filmen i Danmark er en nødvendighed, hvis man som kristen stadig vil bevare sin anstændighed og betragter Jesus som Guds Søn, og dermed historiens helligste og mest enestående personlighed, som man ikke trækker gennem blasfemiens søle. Derfor, boykot »Da Vinci Mysteriet«, som er en røst fra helvedet.

# Sendið tey røttu at ummæla filmar

ÁRNI VANG
Tórshavn

Læs eitt filmummæli hjá Kim Simonsen um MI 3 í Sosialinum í dag. Eg vil beinavegin geva honum rætt í, at MI 3 ikki eru teir »djúpastu« filmarnir, ið eru gjørdir. Menn sum Arnold Schwarzenegger, Bruce Willis, Jacke Chan o. a. fara nokk ongantíð at vinna ein Oscar fyri teirra leiklut í actionfilmunum.

At ein acitonfilmur er léttissoppa, tómt, uttan innihald o.s.v er ikki neyðugt hjá Hr. Simonsen at skriva eina langa svadu um, áðrenn hann fer at »ummæla«, í hesum føri, MI 3. Vit vita øll, og eru einig við Hr. Simonsen at actionfilmar ikki ríka okkum dagin ella nakað. Men tú fer sum ummælari til MI 3 og skal ummæla filmin í samband við aðrar actionfilmar av hasum slagi og ikki koma við onkrari langari svadu, hvussu vánaligir actionfilmar eru. Tín persónliga meining um eina filmsgenru kanst tú brúka eina heila blaðsíðu onkran annan dag, og vit vita, at tú hevur ikki trupulleikar at skriva lesarabrøv. Skrivi hettar av tí orsøk, at eg haldi eisini Sosialurin skal líka senda røttu filmsummælararnar niðan í Havnar Bio. Kim Simonsen t. d. til onkra films-genru, ið honum dámar og hevur eina ávísa vitan um, tí so kann hann koma við konstruktivum kritikki. At senda Kim Simonsen í Havnar Bio at ummæla actionfilmar gevur líka nógva meining sum at senda ein prædikumann at ummæla ein pornofilm. Sjálvur havi eg ikki sæð MI 3 ENN, men gleði meg tann dagin eg fari í Havnar Bio og fái totalt heiladeyðan undirholdning, við somu good guy - bad guy bardøgunum, har kvinnan (og tær eru altíð lekrar) entin er ónd, ella hevur brúk fyri hjálp frá okkara mannliga superhetju. Vónandi fer Kim ikki at seta seg niður nú og skrivar eitt laaaaaaaangt aftursvar til mín, ið eg skal brúka ein heilan seinnapart til at lesa, og bæði kvøld og nátt at analysera fyri at fáa skil á hvat hann hevur sagt. Er ikki eitt persónligt álop á teg, men konstruktivur kritikkur og einki annað. Og vónandi fer tú við somu hugsjón, altso konstruktivan kritikk og ikki persónligt álop, næstu ferð tú skal ummæla ein film. Haldi sjálvur at tú hevði kunnað givið eitt framúrskarandi ummæli til Da Vinci Code, men av orsøkum, ið vit øll kenna (og allur heimurin), so ber tað ikki til.

# Neyðarróp! Neyðarróp!

ANNA M. HENTZE
Søldarfjørður 16/5 – 2006

…..Men eingin hoyrir. – Grát, mítt elskaða land! "Í einum samfelag har tey veikastu hava tað gott, hava øll tað gott" Jú, vit kenna orðini hjá Javna, og tað er so satt, sum tað er sagt, og takk fái øll, ið leggja eitt stórt, ósjálvsøkið arbeiði í at betra um korini hjá teimum veiku. Onkuntíð sær tað tó út sum at veikir bólkar verða "gloymdir". Ella at veikir bólkar, ið áttu at verið vardir, missa ágóðar, ið áður vóru vanlig rættindi. Tað kann tykjast sum um, at bæði samfelagið, og tær mannagongdir ið fáa samfelagshjólini at mala, skulu effektiviserast so nógv, at tað ikki er pláss fyri menniskjunum í maskinarínum. Men hvat renna vit eftir? Hví skal alt vera so effektivt? Hvat er samfelagið annað enn tað staðið, har menniskju, vit øll, skulu liva og trívast? – Har øll eiga at verða vird og vard? Har bæði sterk og veik skulu hava tað gott? Viðhvørt tykir mær, at samfelag okkara alt meir og meir verður innrættað til fólk, ið eru frísk, ung, gløgg, rík og mobil. Men samfelagið eigur at vera líka gott fyri øll, bæði fyri tey fyrst nevndu, og eisini fyri sjúk, gomul, fátæk og tey, ið hava tørv á meir umsorgan. (ja, um tað so var Jógvan Sofus Joensen, ið annars hevur givið mær gásarhold í eina heila viku, inntil hann varð avsannaður í Vikublaðnum í gjár).

Í gjáramorgunin lá bræv frá Postverkinum í postkassanum:

Góði postkundi

…Frá mánadegnum 22. mei 2006 fer postverkið at broyta posttænastuna til húskini í tykkara bygd. …Í staðin fyri at lata post- og pengasendingar til postboðið at avgreiða, mugu tit frá nevnda degi fara á nærmasta posthús at gera postørindi. »Kundar, sum hava fingið fólkapensión útgoldna frá postboðnum, mugu í framtíðini á posthúsið at fáa peningin útgoldnan. …Vónandi elvir broytingin ikki til stórvegis trupulleikar.«

Nú vænti eg ikki, at postverkið roknar við, at fólkapensiónistarnir yngjast, og vónirnar um avmarkaðar trupulleikar eru óivað vælmeintar. Men álvaratos: Tá taxasjaførurin hevur fingið fyri túrin út á posthúsið, er neyvan serliga nógv eftir av tí, frammanundan avmarkaðu, pensión, ið skal røkka til ein heilan mánað. Umframt hetta, eru nøkur gomul fólk, ið sjáldan hætta sær útum. Eg undrist á, um heimahjálpirnar hava loyvi til at fara slík ørindi fyri brúkararnar. Annars mugu tey, umframt at noyðast at leiga bil, eisini fáa fólk at fara fyri seg inn á posthúsið. Henda broyting í tænastuveiting má metast sum eitt stórt afturstig í vælferðarsamfelagnum, men sjálvandi, alt gongur so skjótt fyri seg, at fólk við ábyrgd fyri borgarum landsins, neyvan hava stundir til at brýggja seg um, at ein bólkur av fólki, ið lutvíst er veikur, fær eitt sindur verri kor.

Eitt annað dømi, ið vísir, at tey, ið ikki hoyra til elituna, verða lopin um, er, tá einhvør tænasta verður rætt fram, men einasti máti at ognast hana er við at senda t-post til eina netadressu. Tað eru hóast alt ikki øll, ið hava teldu. Og tað eru ikki øll, ið eru so fim á tastaturinum. Mundi tað, í slíkum førum, ikki eisini borið til at víst á eitt tlf.nr., ið annaðhvørt svarar ella tekur ímóti sms-boðum?

Tað er umráðandi, at menniskju verða vird og vard, tí í einum samfelag har tey veikastu hava tað gott, hava øll tað gott.